## Binda land og kommunur

Sigurð Poulsen, landsbankastjóri, og Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, eru á einum máli um, at landið og kommunurnar eiga at gera eina bindandi avtalu um, hvussu nógvir pengar skulu brúkast um árið. Landsbankastjórin hevur sagt, at avtalan eigur at umfata bæði rakstur, íløgur og skatt, og tað heldur landsstýrismaðurin eisini. Bárður Nielsen sigur eisini, at greiðar reglur skulu áseta, hvat er rakstur, og hvat er íløga.

## Pensjonistar ótolnast

Felagið hjá teimum føroysku pensjonistunum, Landsfelag Pensjonista, vil nú hava landsstýrið at síggja til, at føroyskir pensjonistar fáa somu sømdir sum teirra donsku javnaldrar. Landsfelagið minnir landsstýrið á eina avtalu, sum landsstýrið og stjórnin gjørdu í 1987, og sum sigur, at tann tøka pensjónin skal vera tann sama í Føroyum sum í Danmark. Kortini hava danskir pensjonistar meiri tøkan pening yvir enn teir føroysku, sigur LP.

# Tvørafólk leggja seg í seðlarnar



*Her inni við skúlan í Trongisvági, hevur Tvøroyrar Býráð stórar ætlanir og næsta ár verður farið undir fyrireikingar til at byggja bæði nýggjan skúla og ítróttardepil. Hetta er neyðugt, tí Tvøroyri er afturútsiglt á hesum øki, sigur borgarstjórin*

**Tvøroyrar Býráð leggur nú til brots og er farin undir fyrireikingar til at byggja bæði nýggjan skúla, nýggja svimjihøll og nýggjan fótbóltsvøll**

ÚTBYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tvøroyrar Býráð ætlar rættiliga at leggja seg í seðlarnar tey næstu árini.

Býráðið hevur akkurát samtykt fíggjarætlanina fyri næsta ár og tað er ikki smávegis útbyggingar, ætlanin er at fara undir.

Serliga á mentanarøkinum, ætlar Tvøroyrar Býráð at taka stór tøk tey næstu árini.

Sostatt hevur Tvøroyrar Býráð næsta ár samtykt at seta pening av til at fyrireika at byggja bæði nýggjan skúla, nýggja svimjihøll og nýggjan fótbóltsvøll.

Í eini tvey ár hevur ein arbeiðsbólkur fyrireika nýggjan skúla og næsta ár hevur kommunan so sett 500.000 krónur av til at fyrireika at byggja nýggjan skúla.

### Tíðin farin frá skúlanum

Borgarastjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, sigur, at nú er tíðin farin frá skúlanum á Tvøroyri, sum varð bygdur fyri 30 árum síðani.

Nú á døgum skulu skúlabygningar verða soleiðis, at tað eisini ber til hjá rørslutarnaðum at ferðast ótarnað í teimum. Men skúlin, vit hava, er alt annað enn vinarligur í so máta, tí har eru tær beru trappur.

Tí hevur býráðið í eina tíð hugsað um at byggja nýggjan skúla og næsta ár verður so av álvara farið undir fyrireikingarnar og peningurin, sum er settur av, skal brúkast til projekteringar og annað í tí sambandi.

Av tí at so lítið kjøt er á ætlanini enn, vita tey í løtuni heldur onki um, hvussu stórur og dýrur ein nýggjur skúli verður. Men ætlanin er nú at arbeiða miðvíst við ætlanini.

- Tað verður mett at vera rættiliga dýrt at nútímansgera skúlan og tí hugsað við meiri um at byggja nýggjan skúla, men heilt endaliga avgerð er ikki tikin um tað enn.

Hann sigur, at endar tað við, at nýggjur skúli verður bygdur, verður hann helst bygdur inni í Trongisvági, harsmábarnaskúli er frammanundan og so verða báðir skúlarnir tengdir saman.

Hvat skúlin úti á Tvøroyri skal brúkast til, er støða ikki tikin til.

- Men tað húsið er hóskandi til øll møgulig endamál, bara ikki til skúla.

### Vilja tosa um samstarv

Kristin Michelsen sigur, at í hesum sambandi hugsar Tvøroyrar býráð um at seta seg í sambandi við aðrar kommunur í Suðuroy at tosa um skúlaviðurskiftini. Býráðið hugsar fyrst og fremst um Hvalba og Fámjin, sum samstarva við Tvøroyri frammanundan, men hugsað verður eisini um aðrar kommunur.

- Talan kann verða um at økja um samstarvið á skúlaøkinum og at samansjóða skúlaskapin í Suðuroy meiri, so at vit fáa meiri nyttu burturúr teimum ymsu skúlunum, sigur Kristin Michelsen.

Men enn er hetta alt ov leyst til at siga meiri um enn.

### Nýggjur ítróttardepil

Næsta ár hevur Tvøroyrar Býráð eisini samtykt at brúka 500.000 krónur til at fyrireika arbeiðið at byggja nýggjan ítróttardepil við nýggjum fótbóltsvølli og nýggjari svimjihøll.

Og tað er alt sum talar fyri, at nýggi ítróttardepilin eisini verður bygdur inni í Trongisvági, har skúlin er.

Borgarstjórin á Tvøroyri sigur, at tað er greitt, at gamli vøllurin á Sevmýri verður ikki góðkendur nógv ár afturat og tí er neyðugt at gera nýggjan fótbóltsvøll.

Hann vísir eisini á, at svimjihylurin á Tvøroyri er 40 ára gamal og er illa farin og tí er eisini neyðugt at byggja ein nýggjan.

Men hvussu stórur hann verður, veit hann ikki.

Nú skal ein arbeiðsbólkur arbeiða víðari við hesum ætlanunum.

Borgarstjórin sigur, at tað er neyðugt hjá Tvøroyrar Kommunu at fara undir hesar útbyggingar, tí á hesum økjum er Tvøroyrar Kommuna afturútsigld, tí vit hava ongan góðkendan vøll og svimjihylurin er í vánaligum standi.

Hann sigur, at tað er eisini ætlanin at tosa við aðrar kommunur um samstarv um hesa ætlanina at byggja nýggjan ítróttardepil. Men akkurát, hvat eitt møguligt samstarv skal fevna um, dugir hann ikki at siga beint nú.

## Søkt verður eftir námsfrøðingi

Til Dagrøktina í Nes kommunu verður søkt eftir námsfrøðingi at arbeiða, 40 tímar um vikuna, til eina 1 ára gamla gentu, at byrja 15. januar 2007 ella eftir avtalu.
Um eingin námsfrøðingur søkir starvið, verður hjálparfólk sett fyribil sí eitt ár.

**Arbeiðið umfatar:**
- at fara við gentuni til fysioterapeut og ergoterapeut
- at stuðla gentuni í spæli saman við øðrum børnum
- at stimbra og annars geva henni ein innihaldsríkan dag

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, pedagogurin í skala 11-17 og hjálparfólkini í skala 6-9.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn, saman við prógvum og møguligum viðmælum, skulu verða Nes kommunu í hendi innan 10. januar 2007 kl. 12.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 448462 ella 565020 og tosa við Katrin Poulsen døgrøktarleiðara.

**Nes Kommuna**
650 Toftir
www.nes.fo · nes@nes.fo